# Tveir mans royndarvenja í B36

**Árstalsfelagið í Havn fer møguliga at gera avtalu við tveir útlendskar leikarar, ið skulu styrkja um hópin hjá B36**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

B36 ætlar sær ikki einki í ár. Felagið hevur longu nú havt stóra tilgongd av berandi leikarum, so sum Ronnie Samuelsen, Egil á Bø, Johannes Joensen og Jens Erik Rasmussen. Nú eru tveir mans afturat møguliga á veg í tann frammanundan sera sterka hópin hjá B36.



Danskur málverji leikti venjingardyst mikukvøldið Tá ið B36 mikukvøldið leikti venjingardyst móti skálamonnum í Gundadali, var ein nýggjur maður millum stengurnar. Talan var um danan, Henrik Bødker, ið spælir við danska felagnum Lyngby. Sambært formanninum í B36, Kristian á Neystabø, royndist málverjin væl, og í B36 halda tey, at hann tykist verða ein góður málmaður. Árstalsfelagið hevur altíð havt tríggjar málmenn til tey bæði liðini í teimu báðum ovastu deildinum, og tá nú Magnus Poulsen er givin, noyðast teir at fáa ein nýggjan málmann, sigur formaðurin í B36.

Enn hevur leiðslan í B36 tó ikki gjørt av, um Henrik Bødker fær nakað tilboð um sáttmála, tí hann skal venja nakrar ferðir afturat, áðrenn leiðslan og venjarin í felag taka støðu til, um danin er ein styrkur fyri felagið.

Í gjár skuldi ein brasilianskur miðvallaleikari eisini koma til B36 at royndarvenja, men tá ið vit tosaðu við Kristian á Neystabø, var flogfarið við honum í ikki lent, og tískil var ógreitt nær brasilianin kom. Talan er um ein framsøknan miðvallaleikara, ið áður hevur leikt við danska superligafelagnum Frem. Kristian á Neystabø leggur tó afturat, at B36 hevur eitt gott lið sum er, men tað er altíð gott at hava ein breiðan hóp, sum gevur venjaranum nógvar møguleikar, sigur formaðurin í B36.

*Danski málverjin, Henrik Bødker, royndarvenur í hesum døgum við B36, og spennandi verður at vita, um hann fer at gerast kappingarneyti hjá Tróndi Vatnhamar*

## Tór-Ingar fer til USA

**Ein av mest týðandi leikarunum hjá føroyameistarunum úr HB seinasta kappingarár, Tór-Ingar Akselsen, verður burturstaddur meginpartin av komandi kappingarári**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Vágamaðurin Tór-Ingar Akselsen fekk sítt stóra gjøgnumbrot í føroyskum fótbólti seinasta kappingarár. Tór-Ingar fekk roynt seg á landsliðnum, og í landskappingini var hann ein sera týðandi leikari hjá HB, sum teimum flestu kunnugt eisini gjørdist føroyameistari. Millum annað skoraði Tór-Ingar eitt ógvuliga týðandi mál, tá ið hann í næstseinasta leikumfari legði HB á odda 1-0 móti arvafíggindunum úr B36. Hetta hendi stutt áðrenn leiklok, og við at vinna dystin 2-0 eydnaðist tað samstundis hjá HB at endurvinna føroyameistaraheitið.

Í ár verður tó ikki nógv at síggja til unga vágamannin í heimligu kappingini. Tór-Ingar sigur, at hann síðst í mars mánaða fer til USA á bíbliuskúla, og hann kemur ikki heim aftur fyrr enn í august. Áðrenn leiðin gongur vestur um hav, ætlar Tór-Ingar at hjálpa sínum oyggjafeløgum í FS Vágum í nøkrum dystum í steypakappingini. Tá ið hann so kemur aftur til Føroya, er ikki so nógv eftir av kappingarárinum, og Tór-Ingar veit ikki enn, hvar hann tá fer at spæla, men tað verður so antin í FS Vágum ella í HB, sigur Tòr-Ingar Akselsen at enda.




*Ikki verður nógv at síggja til Tór-Ingar Akselsen í heimligu kappingini í ár*

*savnsmynd*

## Skýlið í Gundadali verður umvælt



*Umvælingararbeiði upp á gamla skýlið í Gundadali er farið í gongd*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Gamla skýlið við ovara vøll í Gundadali er í løtuni undir umvæling**

ÁSKOÐARAVIÐURSKIFTIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Menn eru í løtuni við at umvæla gamla áskoðaraskýlið við ovara vøll í Gundadali. Skýlið bleiv bygt, samstundis sum ovari vøllur bleiv gjørdur, og hetta var í 1976. Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar Býráð, sigur, at talan er um vanligt, men neyðugt, viðlíkahald, ið skal gerast, áðrenn fótbólturin av álvara kemur í gongd. Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at umvælingar verða gjørdar í skýlinum í Gundadali, tí undan Oyggjaleikunum í Føroyum í 1989, vóru nógvar ábøtur gjørdar, Millum annað bleiv skýlið tá klætt innan, og harafturat bleiv ein pallur gjørdur, har gjørligt er hjá koyristólsbrúkarum at sita undir taki og hyggja eftir fótbólti.

Arbeiðið hevur verið boðið út, og tað er sp/f Húsavarðatænastan, ið hevur fingið arbeiðið. Tað stuttliga við hesum er, at teir báðir eigararnir av omanfyrinevndu fyritøku eru báðir tveir kendir í føroyska fótbóltsheiminum. Annar er fyrrverandi liðskiparin á føroyska landsliðnum, Jens Kristian Hansen, og hin er fyrrverandi AB-venjarin og HB-leikarin, Sámal Erik Hentze, so ikki kann sigast annað, enn at teir smíða í heimligum umhvørvi.




## Vegna Føroya Skiftirætt verða niðanfyristandandi ognir lýstar til sølu:

**Bjarnoyarvegur 18, matr. nr. 893 aa, Tórshavn**



Grundøki: 323 $m^2$.
Byggiár: 1971.
Húsini hava kjallara og miðhædd, uml. 100 $m^2$ hvør hædd.
Húsini eru innrættað soleiðis: Durur, lítil gangur, køkur, stova, 3 kømur, wc og baðirúm.
Kjallari: trappu-uppgongd, vaskirúm/fýrrúm, durur, gangur, inngongd, 3 kømur, køkur, stova og baðirúm við wc.
Urtagarður og gyrðing eru kring húsini.

---

**Eldri sethús í Skopun**
Matr.nr. 741, Skopun.
Grundøki: mett til uml. 280 $m^2$
Húsini hava lágan kjallara, miðhædd og loft.
Miðhædd: stova, kamar, gangur, baðirúm, køkur.
Loft: gangur, 3 kømur (eitt er kvistur), wc.
Gjørt er rundanum húsini. Hjallur og fjós eru á stykkinum.
Húsini liggja væl fyri í gomlu bygdini við sera góðum útsýni.
Nærri upplýsingar um ognirnar fáast frá undirritaðu.
Tað stendur skiftirættinum frítt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
110 Tórshavn
Telefon: 311145
Telefax: 311525
e-mail: advlaw@advlaw.fo



## Grundstykki til sølu

Matr. nr. 91C 1164 $km^2$ liggur miðskeiðis á Argjum, við sera góðum útsýni.

Boð undir 1 mió. ongan áhuga.

**Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari**
**tlf. 219279**





**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3725
**Navn:** P/F ISS Føroyar
**Hjánøvn:** P/F ISS Faroe Islands (P/F ISS Føroyar) og P/F ISS Food Hygiene (P/F ISS Føroyar)
**Adressa:** c/o P/F SMS, á Trapputrøðni, Box 1059, 110 Tórshavn.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 05.02.2004
**Viðtøkudato:** 05.02.2004
**Kapitalur:** Kr. 500.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 500.000,00 til kurs 200.
**Stovnarar:** P/F SMS, 100 Tórshavn (P/F 207) og ISS Food Hygiene A/S, Møntmestervej 31, DK-2400 København NV.
**Nevnd:** Jan Jakobsen, Vestager 9, DK-7490 Aulum (formaður), Christian Andreasen, Høvdagøta 6, 160 Argir, Niels Mortensen, Traðarvegur 12, 100 Tórshavn og Jack Nielsen, Tulipanmarken 13, DK-2680 Solrød Strand.
**Stjórn:** Niels Mortensen, Traðarvegur 12, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra saman við nevndarformanninum ella av trimum nevndarlimum saman.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 05.02.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka tænastuvirksemi innan Facility service og Food Hygiene og líknandi tænastuvirksemi í Føroyum.

*Skráseting Føroya tann 18. februar 2004*

*Kristin Balle*


**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

## Leiðsluskrivari

Av tí at okkara skrivstovuleiðari gjøgnum mong ár fer frá, verður starv sum leiðsluskrivari til Meginskrivstovuna hjá Heimarøktini og Serforsorgini lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Hevur tú hug á avbjóðingum, ert sjálvstøðug/ur, álítandi og røkin so bjóða vit eitt starv sum inniheldur m.a. hesar høvuðsuppgávur:

- standa fyri og uppbyggja journalskipanina
- skrivari hjá stjóranum
- samskipa skrivstovuvirksemi
- hava starvsfólkaviðurskifti og arbeiðsætlanir á Meginskrivstovuni um hendi
- málsviðgerð og avgreiðslu av málum
- luttøka í tvørgangandi samstarvi

**Vit vænta at tú lýkur hesi førleikakrøv:**
- hevur viðkomandi útbúgving og starvsroyndir
- hevur hollan málsligan førleika serliga í føroyskum
- ert von/vanur við at skriva
- kennir til elektroniska journalskipan
- hevur hollan telduførleika
- hevur góð samskiftisevni og dugir væl við fólki

**Løn- og setanarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Heimarøktin og Serforsorgin. Tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan

Tann, ið settur verður má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Heimarøktina og Serforsorgina á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsóknarfreist:** 2. mars 2004

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
att.: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Sosiala deild**

Sosiala deild er partur av trivnaðarfyrisitingini og umsitur m.a. tey málsøki, sum sambært galdandi almannalóggávu eru løgd til kommununa at umsita.

Kommunan bjóðar eitt áhugavert starv við fjølbroyttum uppgávum í einum mennandi fakligum umhvørvi.

www.torshavn.fo

## Sosialráðgevi

Á sosialu deild kommununnar er eitt fulltíðar starv fyri sosialráðgeva í farloyvi frá 1. mai 2004 til umleið 1. mars 2005 leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar. Sosialráðgevin kemur tó í stóran mun at arbeiða við barnaverndarmálum. Deildin leggur stóran dent á tvørfakligt samstarv, og kemur sosialráðgevin at hava tætt samstarv við aðrar fakbólkar.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, ella Onnu Mariu Troest, sosialráðgeva, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. mars 2004. Viðmerk á umsóknina "Sosialráðgevi".